LM-012/2025

# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 25. juni 2025 |
| Mál nr.: | 25/19981 |
| Málsviðgjørt: | OYS |
| Ummælistíð: | N/A |
| Eftirkannað: | 15.07.2025 |

**Uppskot til**

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum

(Prosjektera næsta byggistig fram til útboð)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 83 frá 22. juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 29. mai 2024 og løgtingslóg nr. 62 frá 28. apríl 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1, stk. 1, 1. pkt. og stk. 2 verður "Landsstýrismanninum" broytt til: "Landsstýrisfólkinum".

**2.** Í § 1 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Landsstýrisfólkinum verður eisini heimilað at halda útreiðslur til víðari at prosjektera næsta byggistig í skúlabygningunum á Frælsinum fram til útboð. Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 14,5 mió. kr."

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Við heimild í løgtingslóg nr. 83 frá 22 juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 62 frá 28. apríl 2025, er ein heildarætlan ment fyri skúlabygningarnar á Frælsinum og prosjektering av byggiskrá og skipanaruppskoti er ígongd og væntast at verða liðugt um miðjan november 2025. Talan er um eina heildarætlan, sum vinnandi arkitektarnir hava ment saman við Fróðskaparsetrinum og Landsverki, sum nú verður prosjekterað fram til skipanaruppskot.

Endamálið við heildarætlanini er at varðveita, tillaga og bjarga einum gomlum skúlabygningi, og geva honum nýtt lív sum ein framtíðartryggjaður universitetsbygningur. Skipanaruppskotið fer at vísa á, hvussu skúlabygningarnir verða skipaðir til tær tríggjar deildirnar, sum eftir ætlan skulu brúka skúlabygningarnar: Námsvísindadeildin, Náttúruvísindadeildin og Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi.

Í heildarætlanini er lagt upp til, at umleið 7.000 $m^2$ skulu høvuðsumvælast, við støði í royndunum frá høvuðsumvælingini av teimum 1.200 $m^2$, sum lon 5 umfatar. Hartil leggur heildarætlanin upp til, at umleið 3.500 $m^2$ verða lagdir aftrat skúlabygningunum, soleiðis at tríggjar – og ikki einans tvær – deildir á Fróðskaparsetrinum kunnu rúmast í skúlabygningunum.

Tá Løgtingið samtykti galdandi løgtingslóg varð gjørt av, at lógin skal fevna um prosjektering av byggiskrá og skipanaruppskoti fyri skúlabygningarnar á Frælsinum. Ætlanin við hesari løgtingslógini er nú, við støði í skipanaruppskotinum, víðari at prosjektera næsta byggistig fram til útboð, við støði í tí mest átrokandi tørvinum hjá Fróðskaparsetrinum og hvat byggitekniskt er skilabest at byrja við. Prosjekteringin av næsta byggistigi er mett at kosta 14,5 mió. kr. Næsta byggistig fevnir um høvuðsumvæling og umbygging av lon 2, lon 3 og lon 4 og samanbygging millum lonirnar, umframt at garðarnir millum lonirnar verða gjørdir. Byggistigið fevnir um umleið 2.100 $m^2$ av høvuðsumvæling og 1.000 $m^2$ av afturatbygging.

Prosjekteringin av næsta byggistigi er eitt av fleiri sporum í yvirskipaðu kampusætlanini hjá Fróðskaparsetrinum. Tey fyrstu 2 sporini eru: 1) At høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningin á Frælsinum, 2) Nýggi felagsbygningurin, sum í løtuni verður prosjekteraður. Næstu sporini eru hølisumstøðurnar hjá Føroyamálsdeildini og Søgu- og samfelagsdeildini, soleiðis at alt undirvísingar- og granskingarvirksemið hjá Fróðskaparsetrinum kann savnast í kampusøkinum á Debesartrøð og Frælsinum. Í løtuni heldur Søgu- og samfelagsdeildin til í leigumáli á Jónas Broncks gøtu 25, meðan Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi og ein partur av Náttúruvísindadeildini halda til í leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum. Parkering til starvsfólk og lesandi er somuleiðis eitt spor í kampusætlanini.

Skipanaruppskotið verður klárt um miðjan november 2025, og prosjekteringstoymið ætlar at byrja prosjekteringina av næsta byggistigi beint eftir hetta, og útboð av byggingini væntast at verða á sumri í 2026.

Byggingin av næsta byggistigi verður partur av egnari løgtingslóg, sum verður løgd fyri Løgtingið, tá ið útboð hevur verið og tikið er av vinnandi tilboði. Henda komandi løgtingslóg skal eisini fevna um víðari at prosjektera eitt triðja byggistig.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er løgtingslóg nr. 83 frá 22. juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 62 frá 28. apríl 2025.

Løgtingslógin heimilar landsstýrisfólkinum at brúka í mesta lagi 39 mió. kr. til høvuðsumvæling og umbygging av pørtum av skúlabygningunum á Frælsinum. Í hesum fyrsta byggistigi er talan um at høvuðsumvæla lon 5. Upphæddin, sum tað í mesta lagi er loyvt at brúka, er íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv, umframt útreiðslur til at gera eina heildarætlan fyri skúlabygningarnar á Frælsinum. Løgtingslógin heimilar hartil landsstýrisfólkinum at brúka í mesta lagi 7,3 mió. kr. til at prosjektera heildarætlanina fyri skúlabygningarnar á Frælsinum fram til skipanaruppskot.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa heimild til í mesta lagi at brúka 14,5 mió. kr. til víðari at prosjektera næsta byggistig fram til útboð.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið gevur landsstýrisfólkinum loyvi til at skipa fyri, at næsta byggistig í verkætlanini at høvuðsumvæla skúlabygningarnar á Frælsinum verður víðari prosjekterað fram til útboð. Prosjekterað verður við støði í skipanaruppskoti fyri skúlabygningarnar. Næsta byggistig fevnir um høvuðsumvæling og umbygging av lon 2, lon 3 og lon 4 og samanbygging millum lonirnar, umframt at garðarnir millum lonirnar verða gjørdir. Byggistigið fevnir um umleið 2.100 $m^2$ av høvuðsumvæling og 1.000 $m^2$ av afturatbygging. Byggingin av næsta byggistigi verður partur av egnari løgtingslóg.

Heildarætlan leggur upp til at høvuðsumvæla skúlabygningarnar og binda lonirnar saman við afturatbygging. Umleið 7.000 $m^2$ av heildarætlanini umfata høvuðsumvæling, sum verður gjørd við støði í royndunum frá høvuðsumvælingini av teimum 1.200 $m^2$, sum lon 5 umfatar. Hartil leggur heildarætlanin upp til, at umleið 3.500 $m^2$ verða bygdir aftrat, soleiðis at Fróðskaparsetrið fær meira nyttu burtur úr skúlabygningunum, enn um skúlabygningarnir bara vóru høvuðsumvældir.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið er gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið, Landsverk og Fróðskaparsetrið.

Lógaruppskotið er ikki lagt fram til almenna hoyring.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Prosjekteringin av næsta byggistigi fram til útboð í samlaðu verkætlanini at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, ið verður gjørt við støði skipanaruppskotinum fyri skúlabygningarnar á Frælsinum, kostar sambært Landsverki 14,5 mió. kr.

Prosjekteringin fevnir um ráðgeving í prosjekteringsfasurnar prosjektuppskot, forprosjekt og høvuðsprosjekt. Hartil fevnir kostnaðurin av prosjekteringini eisini um aðrar útreiðslur so sum verkætlanarleiðslu, ráðgeving, HTU-samskipara, málsettar útreiðslur og ókent.

**Kostnaðarætlan fyri prosjekteringina**

| Postar | Ár 2025 | Ár 2026 | Í alt |
|---|---|---|---|
| Ráðgeving undir prosjektering | 2.200.000 | 9.300.000 | 11.500.000 |
| Aðrar útreiðslur | 300.000 | 2.700.000 | 3.000.000 |
| **Útreiðslur í alt** | **2.500.000** | **12.000.000** | **14.500.000** |

Ætlandi skal prosjekteringin verða liðug í fyrru hálvu av 2026, soleiðis at klárt er at fara undir at byggja næsta byggistig í seinnu hálvu av 2026.

Samlaða upphæddin, sum verklagslógin heimilar landsstýrisfólkinum at brúka, er í mesta lagi 14,5 mió. harav 2,5 mió. kr. verða brúktar í 2025 og 12 mió. kr. í 2026. Við hesum verða til samans 60,8 mió. kr. brúktar upp á verkætlanina at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, íroknað prosjektering av heildarætlanini fram til skipanaruppskot og víðari at prosjektera næsta byggistig fram til útboð.

**Samlað kostnaðarætlan fyri verkætlanina; høvuðsumvæling, prosjektering av heildarætlan og prosjektering av næsta byggistigi fram til útboð**

| | |
|---|---|
| Útreiðslur sambært lógaruppskotinum;<br>Prosjektering av næsta byggistigi fram til útboð | <br>14.500.000 |
| | |
| Útreiðslur sambært galdandi verklagslóg;<br>Høvuðsumvæla og umbyggja lon 5<br>Prosjektering av heildarætlan fram til skipanaruppskot | <br>39.000.000<br>7.300.000 |
| **Útreiðslur í alt sambært dagførdu verklagslógini** | **60.800.000** |

Frá 2022 til 2024 eru 23,8 mió. kr. brúktar til høvuðsumvælingina og umbyggingina sambært galdandi verklagslóg. Framfluttar eru 17 mió. kr. í óbrúktari játtan frá 2024, meðan 19 mió. kr. eru játtaðar í fíggjarlógini fyri 2025. Tøka játtanin er tískil 36 mió. kr. í 2025, harav í mesta lagi 15,2 mió. kr. verða brúktar til at høvuðsumvæla og umbyggja lon 5 lidna, og í mesta lagi 7,3 mió. kr. verða brúktar til prosjekteringina av samlaðu verkætlanini fram til skipanaruppskot.

Tøka játtanin í 2025 til víðari prosjektering av næsta byggistigi fram til útboð er tí 13,5 mió. kr. Víðari prosjekteringin er mett at kosta 14,5 mió. kr. Væntandi verða 2,5 mió. kr. nýttar til víðari prosjekteringina í 2025, og 11 mió. kr. framfluttar í óbrúktari játtan frá 2025 og tøkar til víðari prosjekteringina í 2026. Tískil verður tørvur á játtan á 1 mió. kr. afturat í 2026 fyri at gera víðari prosjekteringina fram til útboð lidna, umframt at tørvur verður á játtan til at byrja byggingina í seinnu helvt av 2026.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur við sær jaliga ávirkan á byggivinnuna vegna økt ráðgevingar- og byggivirksemið.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Skúlabygningarnir á Frælsinum verða høvuðsumvældir, umbygdir og útbygdir samsvarandi galdandi regluverki innan bygging og halda seg til nútímans orkukrøv. Avgerð bleiv tikin um at varðveita og umbyggja verandi skúlabygningar, heldur enn at ríva teir niður, og hetta er mett at hava jaliga ávirkan á umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið er framhaldandi liður í at fremja eina samlaða kampusverkætlan á Frælsinum í Tórshavn, har alt Fróðskaparsetrið við tíðini verður samlað. Lógaruppskotið fer tískil at hava jaliga ávirkan á virksemið á staðnum, bæði í byggitíðarskeiðinum, og tá ið verkætlanin verður liðug. Lógaruppskotið fer eisini at hava jaliga ávirkan á Føroyar sum heild, tí lógaruppskotið er við til at betra um karmarnar hjá Fróðskaparsetrinum, ið er okkara universitet, hvørs aðalmál er burðardygg menning av føroyska samfelagnum, har gransking og hægri útbúgving eru kjarnin í virkseminum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Tá ið skúlabygningarnir á Frælsinum eru liðugt høvuðsumvældir, umbygdir og útbygdir samsvarandi við tørvin hjá Fróðskaparsetrinum, fær tað jaligar avleiðingar fyri lesandi og starvsfólk á Fróðskaparsetrinum, tí fysisku karmarnir kring Fróðskaparsetrið verða munandi betri.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakrar millumtjóðasáttmálar.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**

   Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**

   Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til mannarættingasáttmálan, EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Fólk, sum bera rørslu-, hoyri- og sjónbrek, skulu kunna nýta hølini í skúlabygningunum á Frælsinum. Mett verður tí, at lógaruppskotið er í samsvari við ST sáttmálan um rættindi einstaklinga, ið bera brek (Breksáttmálin).

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar, og ongar kendar markaforðingar eru á økinuum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, útpanting, ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrisfólkinum at brúka í mesta lagi 14,5 mió. kr. til víðari at prosjektera næsta byggistig fram til útboð í verkætlanini at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum.

Tað er Landsverk, sum umsitur verkætlanina og játtanina sum byggiharri, vegna landsstýrisfólkið.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Ja | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
Í løgtingslógini verður landsstýrismaður broytt til landsstýrisfólk.

**Til § 1, nr. 2**
Greinin heimilar landsstýrisfólkinum at brúka í mesta lagi 14,5 mió. kr. til víðari at prosjektera næsta byggistig av skúlabygningunum á Frælsinum fram til útboð. Næsta byggistig fevnir um at høvuðsumvæla og umbyggja lon 2, lon 3, lon 4 og samanbygging millum lonirnar. Prosjekterað verður við støði í skipanaruppskotinum fyri skúlabygningarnar á Frælsinum.

**Til § 2**
Greinin er gildiskomuregla. Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men høvuðslógin, t.e. løgtingslóg nr. 83 frá 22. juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, hevur eina sólseturáseting, sum er 1. januar 2027.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 16. september 2025

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Heildarætlanin fyri skúlabygningarnar á Frælsinum
Fylgiskjal 3: Mynd av næsta byggistigi